# Frágreiðing
# frá
# landsstýrismanninum í fíggjarmálum

Altjóða búskapurin

Føroyski búskapurin

Búskaparpolitikkur 2008

Fíggjarlógaruppskotið 2008

Raðfestingar í 2008

Fíggjarmálaráðið

# Frágreiðing

Fíggjarlógaruppskotið 2008

Oktober 2007

# INNIHALDSYVIRLIT

1. FORMÆLI LANDSSTÝRISMANSINS...3
2. INNGANGUR...5
3. ALTJÓÐA BÚSKAPURIN...6
3.1 Støðan í altjóða búskapinum...6
3.2 Støðan í norðurlendsku búskapunum...10
3.3 Útlitini fyri altjóða búskapin...14
4. FØROYSKI BÚSKAPURIN...15
4.1 Gongdin í samlaða virkseminum...15
4.2 Gongdin í privata vinnulívinum...18
4.3 Gongdin í privata húsarhaldinum...20
4.4 Gongdin í almenna búskapinum...21
4.5 Gongdin í fólkatalinum...23
4.6 Gongdin í arbeiðsloysinum...24
4.7 Gongdin í brúkaraprístalinum...25
4.8 Gongdin í fíggjarsektorinum...26
4.9 Gongdin á handilsjavnanum...27
4.10 Framtíðarútlitini fyri føroyska búskapin...30
5. FÍGGJARLÓGARUPPSKOTIÐ 2008...31
5.1 Búskaparpolitikkurin 2008...31
5.2 Úrslitið á fíggjarlógaruppskotinum 2008...32
5.3 Gongdin í inntøkum landskassans...33
5.4 Gongdin í útreiðslum landskassans...34
5.5 Raðfestingar hjá einstøku landsstýrismonnunum í 2008...35
5.6 Løgur 2008...40
5.7 Gongdin í skuld og gjaldføri landskassans...42

Fíggjarmálaráðið
Postboks 2039
FO-165 Argir
Telefon: 35 20 20
Telefax: 35 20 25
**www.fmr.fo**

# 1. FORMÆLI LANDSSTÝRISMANSINS

Við hesum verður eitt tálmandi fíggjarlógaruppskot lagt fyri tingið fyri fíggjarárið 2008.

*Ilt er at spáa – serliga um framtíðina*, segði Storm P, og júst hetta, at skula spáa um útlitini fyri komandi árið, er ein av trupulleikunum tá eitt fíggjarlógaruppskot skal leggjast til rættis eftir konjunkturunum.

Seinastu tvey árini hava verið merkt av stórum vøkstri, men nú byrja sokallaðu fløskuhálsarnir at gerast sjónligir. Arbeiðsmarknaðurin er undir stórum trýsti og lønarglíðing er at síggja. Arbeiðsgevararnir rópa varskó, tí teir í stóran mun mangla fólk til at gera arbeiðið, og útlit eru ikki fyri at støðan vendur í bræði.

Arbeiðið við hesum fíggjarlógaruppskotinum hevur tí lagt seg eftir at fáa eina tálmandi fíggjarlóg.

Tá búskapurin skal tálmast, er neyðugt at nýta røttu amboðini. Ein fíggjarlóg hevur til hetta endamál tríggjar síður – inntøkur, rakstur og íløgur.

Vanliga verður sagt, at rættast er at stýra við íløgunum og inntøkusíðuni og ikki við rakstrinum. Orsøkin til hetta er, at meðan tað er gjørligt at broyta íløgur og inntøkur rættiliga skjótt og lætt, er munandi drúgvari og verri at gera størri intriv á rakstrinum. Tískil er eisini størsti denturin lagdur á at tálma við "amboðum" á løgu- og inntøkusíðuni á hesi fíggjarlógini.

Sjálvsagt skal eisini ansast væl eftir, at raksturin ikki veksur ov nógv, og tað er eisini gjørt undir hesum fíggjarlógararbeiðinum, men gongdin á raktrinum skal fyrst og fremst lagast eftir hvat fyri vælferðarsamfelag vit ynskja, og hvat vit hava ráð til.

Á inntøkusíðuni er ætlaði skattalættin minkaður og avgjøld eru hækkaði. Á útreiðslusíðuni er løgukarmurin minkaður fyri at tálma almenna byggivirksemið.

Sjálvt um fíggjarlógin er tálmandi, hevur eisini verið gjørligt at finna rúm fyri raðfestingum. Her er serligur dentur lagdur á økini *vælferð*, *umhvørvi* og *útbúgving og gransking*.

***Magni Laksáfoss***

# 2. INNGANGUR

Endamálið við hesi frágreiðingini er at skapa betri grundarlag fyri viðgerðini av fíggjarlógaruppskotinum.

Frágreiðingin byrjar við at lýsa gongdina í altjóða búskapinum og ymiskum viðurskiftum, ið hava týdning fyri gongdina og útlitini. Eisini er ein serlig lýsing av gongdini og útlitunum fyri norðurlendsku búskapirnar.

Næsti parturin í frágreiðingini er ein meira nágreinilig lýsing av gongdini og útlitunum í føroyska búskapinum. Gongdin og útlitini í ymiskum týdningarmiklum pørtum í føroyska búskapinum verða lýst við tí vitan og tølum, ið vóru tøk í september 2007.

Triði parturin er um fíggjarlógaruppskotið og búskaparpolitikkin í fíggjarlógaruppskotinum 2008. Ymsar greiningar eru av inntøkum og útreiðslum landskassans seinastu árini.

Í hesum partinum er eisini eitt stutt yvirlit yvir, hvørjar játtanarligar broytingar eru á málsøkjunum hjá hvørjum einstøkum landsstýrismanni frá fíggjarlógini 2007 til fíggjarlógaruppskotið 2008. Nærri viðmerkingar og grundgevingar fyri broytingunum á einstøku játtanunum eru í viðmerkingunum til hvørja einstaka høvuðskontu í fíggjarlógaruppskotinum.

# 3. ALTJÓÐA BÚSKAPURIN

## 3.1 Støðan í altjóða búskapinum

Mett verður, at stóri vøksturin í altjóða búskapinum seinastu árini fer at halda sær eina tíð frameftir. Altjóða BTÚ[1]-vøksturin var 5,5% í 2006 og verður framhaldandi mettur at fara at liggja um 5%.

Fara metingarnar at halda sær, so verður hetta størsta búskaparliga framgongdin í altjóða búskapinum síðan fyrstu árini av 1970-árunum. Tað er nú serliga Kina, sum er drívmegin í framgongdini í altjóða búskapinum. Stóri vøksturin í Kina seinastu árini hevur havt við sær, at Kina nú er vorðin nógv størri partur av altjóða búskapinum. Búskaparlig vøksturin hevur eisini verið stórur í India og Russlandi, men í USA hevur eitt ávíst fall verið í vøkstrinum. Kinverski búskapurin verður sostatt ein alsamt størri og týdningarmikil partur í altjóða búskapinum.

Seinastu tíðina hevur verið rættiliga ófriðaligt á altjóða fíggjarmarknaðunum. Ófriðurin byrjaði, tá tað fréttist, at lántakarar í USA høvdu fingið trupulleikar við at gjalda aftur tey sokallaðu *subprime*[2] bústaðarlánini. Hetta hevði við sær, at lángevarar mistu pengar, eisini uttan fyri USA.

Fíggjarmarknaðirnir eru tætt samanknýttir. Tí nervar órógvin um *subprime* lánini í USA íleggjarar allastaðni í altjóða fíggjarheiminum. Hetta hevur skapt eina altjóða gjaldføriskreppu, sum miðbankarnir í USA og Evropa hava roynt at loysa við at økja um gjaldførið á fíggjarmarknaðunum.

Evropeiski miðbankin, ECB, hækkaði rentuna 0,25% í juni í ár. Fyri góðum mánað síðan vóru útlit fyri, at miðbankin fór at fremja 2 rentuhækkingar afturat í ár, tí fyrru í september og tí seinnu í desember, men ófriðurin á fíggjarmarknaðunum hevur fingið ECB at leggja politikkin um. Á tíðindafundi 6. september boðaði

[1] Bruttotjóðarúrtøkan, BTÚ, er eitt mát fyri vinnuligu inntøkuskapanina, sum framleiðsluvirðið minus rá- og hjálpievni.
[2] Subprime lán eru lántakarar, ið ikki kunnu veita so góða trygd fyri lántøkuni.

miðbankin frá, at fleiri rentuhækkingar verða ikki framdar so leingi ófriður er á fíggjarmarknaðunum. Rentan verður tí verandi 4%. Støðan á fíggjarmarknaðunum verður tí eisini avgerandi fyri ætlaðu rentuhækkingina í desember.

Á tíðindafundi 18. september boðaði amerikanski miðbankin, FED, somuleiðis frá, at bankin leggur rentupolitikkin um. Miðbankin lækkaði rentuna 0,5%. Hetta er dupult so stór lækking, sum flestu eygleiðarar høvdu mett frammanundan.

Ófriður á fíggjarmarknaðunum ávirkar vanliga ikki búskapargongdina, tí tað er støðan í búskapinum, sum ávirkar fíggjarmarknaðirnar og ikki umvent. Er búskapurin sunnur og sterkur við góðum lyklatølum og úrslitum hjá privata vinnulívinum, so er eingin orsøk at stúra fyri fallandi virðum á partabrøvum og øðrum virðisbrøvum á fíggjarmarknaðunum. Ófriður er tó ofta á fíggjarmarknaðunum, uttan at ófriðurin er grundaður á veruligu støðuna og gongdina í búskapinum. Hetta er tá fjáltur kemur á íleggjarar, tá teir frætta ymisk tíðindi, sum seinni vísa seg ikki at vera so álvarslig kortini.

Tað eru ymiskar meiningar um, hvørjar avleiðingar kreppan við amerikansku *subprime* bústaðarlánunum fer at fáa. Tey flestu hava mett, at hetta er ein fíggjarkreppa, sum fer at hasa av aftur uttan at fáa búskaparligar avleiðingar. Í seinastuni eru tó tekin komin um, at búskapurin ikki sleppur so snikkaleysur burtur úr kreppuni á amerikanska bústaðarmarknaðinum.

Tað eru tølini í einari nýggjari frágreiðing um amerikanska arbeiðsmarknaðin, sum geva hesar ábendingar. Áðrenn frágeiðingin varð kunngjørd, 7. september í ár, mettu eygleiðarar, at tað fóru at verða 110.000 fleiri arbeiðspláss í USA, men tølini fyri august vístu 4.000 færri arbeiðspláss. Tað er líkt til, at amerikanska vinnan ikki longur heldur, at *subprime* kreppan bert fer at vara í stutta tíð. Amerikanska vinnan er tí farin at tillaga seg fallandi vøkstur í virkseminum og tí minkar hon um starvsfólkatalið.

Rentulækkingin á 0,5% kann eisini vera tekin um, at støðan í amerikanska búskapinum er verri enn hildið hevur verið higartil.

Tað er framvegis stórur fíggjarligur ójavni í altjóða búskapinum. Stóra gjaldsjavnahallið í USA vigar upp ímóti eins stórum gjaldsjavnaavlopum í Kina og oljuútflytaralondunum. USA hevur enn ikki fingið trupulleikar við at fíggja stóra gjaldsjavnahallið. Hóast lutfalsligu lágu rentuni og vandanum fyri, at dollarin viknar enn meira, eru íleggjarar framvegis sinnaðir at gera íløgur í amerikonsk virðisbrøv. Dollarin viknaði nógv eftir seinastu rentulækkingina í USA.

Nýggjar metingar um dollarkursin siga, at miðal dollarkursurin verður 5,52 kr. í 2007 og 5,42 kr. í 2008. Henda metingin er lægri enn metingarnar, sum vórðu gjørdar fyrr í ár, men áðrenn seinastu rentulækkingina. Rentulækkingin kann ávirka metingina enn longur niður.

Stóri vøksturin og eftirspurningurin í altjóða búskapinum hevur við sær, at framleiðsluorkan hevur ilt við at fylgja við. Hetta økir um vandin fyri vaksandi inflasjón. Fremsta málið hjá miðbankunum í USA og Evropa hevur verið at halda inflasjónini niðri við at fremja rentuhækkingar. Kreppan á altjóða fíggjarmarknaðunum hevur tó noytt miðbankarnar fyribils at broyta kós. Evropeiski miðbankin hækkaði ikki rentuna í september, hóast bankin hevði ætlanir um rentuhækkingar fyri stuttari tíð síðan. Inflasjónspolitikkurin verður ikki tikin upp aftur fyrr enn ófriðurin á fíggjarmarknaðunum hevur lagt seg. Næsta rentuhækkingin kemur tí neyvan fyrr enn í desember 2007.

Vaksandi inflasjón sæst longu aftur í vaksandi prísum á rávørum. Prísirnir á jarni og ráolju eru hækkaðir og í seinastuni eru prísirnir á matvørum eisini farnir at hækka. Ein orsøk til at matvøruprísirnir nú eisini hækka er skjótt vaksandi miðalklassin í Kina, sum hevur vesturlendskar matvanar. Umframt at vesturlendingar og kinverjar nú fara at eta úr sama spísikamari, so hava vesturlendingar eina rættiliga stóra yvirnýtslu av matvørum samanborið við matvanarnar í siðbundnu kinversku matmentanini.

Oljuprísurin hevur í summar verið á leið tann sami sum á sumri 2006, tá hann var beint niðanfyri 80 $ fyri tunnuna. Í september í ár setti oljuprísurin met, tá hann fór upp um 81 $ fyri tunnuna. Oljuprísurin hækkaði nógv tá tað frættist, at oljugoymslurnar í USA eru væl minni enn mett var frammanundan. Útlit eru tí fyri høgum oljuprísi restina av árinum.

Hvussu ávirkar gongdin í altjóða búskapinum føroyska búskapin?

Føroyski búskapurin er sera lítil og sera opin. Tí hava føroyingar stórt handils-samskifti við útheimin.

Stóri vøksturin í altjóða búskapinum hevur við sær stóran vøkstur í eftir-spurninginum eftir vørum, tænastum, kapitali og arbeiðsmegi. Vøksturin sæst tí eisini aftur í tí, sum føroyingar hava at bjóða á altjóða marknaðinum. Hetta hevur stimbra virksemi í føroyska búskapinum, men í seinastuni hevur stóri eftir-spurningurin eftir arbeiðsmegi um okkara leiðir virka avmarkandi á virksemi. Manglandi arbeiðsmegi er vorðin ein vaksandi trupulleiki um okkara leiðir seinastu árini.

Føroyski útflutningurin til londini, sum nú eru drívmegin í framgongdini í altjóða búskapinum er lítil. Tí vaksa føroysku útflutningsinntøkurnar á marknaðunum í Kina, India og Russlandi lítið. Kina er harafturímóti ein týðandi kappingarneyti hjá føroysku útflutningsvinnuni. Lønarlagið í Kina er nógv lægri enn í Føroyum, tí er t.d. fiskaframleiðsla og aðrar lønarkrevjandi framleiðlur nógv bíligari í Kina enn í Føroyum. Hetta gevur kinverjum ein týðandi kappingarfyrimun á altjóða marknaðinum.

Føroyingar nýta framvegis lutfalsliga nógva olju. Tí hevur gongdin í oljuprísinum stóran týdning fyri virksemi í føroyska búskapinum. Hækkandi oljuprísir tálma og lækkandi oljuprísir stimbra virksemi í føroyska búskapinum. Høgir oljuprísir økja harafturímóti áhugan fyri at bora eftir olju við Føroyar.

Gongdin í altjóða rentuni hevur beinleiðis ávirkan á føroyska búskapin, tí føroyska rentan fylgir altjóða rentuni. Lækkandi renta stimbrar og hækkandi renta tálmar virksemi í føroyska búskapinum.

Vaksandi matvøruprísirnir virka bæði stimbrandi og tálmandi á føroyska búskapin. Føroyska útflutningsvirði hækkar, tí størsti parturin av føroyska útflutninginum eru matvørur. Innflutningsvirðið hækkar eisini, tí føroyingar innflyta eisini nógvar matvørur.

Gongdin í dollaranum kann virka bæði stimbrandi og tálmandi á virksemi í føroyska búskapinum. Hækkar dollarin fer oljuprísurin upp, tí olja verður handlað í dollarum á altjóða marknaðinum. Føroyingar fáa eisini meira fyri sínar vørur á amerikanska marknaðinum samstundis sum tey londini, sum selja sínar vørur fyri dollarar, verða minni kappingarfør mótvegis føroyingum, tá dollarin fer upp. Tað umvenda er sjálvandi galdandi, tá dollarkursurin lækkar.

## 3.2 Støðan í norðurlendsku búskapunum

BTÚ-vøksturin í Norðurlondum setti næstan met í 2006. Privatar íløgur, privat nýtsla og útflutningsvøkstur í Finnlandi og Svøríki hevur verið drívmegin í vøkstrinum. BTÚ- vøksturin var 5,5% í Finnlandi, 4,4% í Svøríki og 4,6% í Noregi. Vøksturin á umleið 3% í Danmark og Íslandi var eisini stórur, tá atlit verða tikin at lága arbeiðsloysinum í hesum londunum. Hóast vøksturin í Norðurlondum nú byrjar at minka, so er hann framvegis stórur, samanborið við Evrulondini, sí talvu 3.1.

Konjunkturframgongdin í Norðurlondum seinastu árini hevur havt við sær, at arbeiðsloysið er lítið, Finnland undantikið, sí talvu 3.2. Arbeiðsloysið minkar framvegis og fer eisini at minka í 2008, samstundis sum tað verður ein alsamt størri trupulleiki, at útboð og eftirspurningur eftir arbeiðsmegi ikki passa saman.

Inflasjónin hevur verið lág í øllum Norðurlondum uttan í Íslandi, men har fer inflasjónin væntandi at falla í ár og í 2008, sí talvu 3.2. Tekin eru nú um, at stóri vøksturin í eftirspurninginum og í BTÚ fer at økja um prísvøksturin, samstundis sum minkandi arbeiðsloysið fer at økja um lønartrýstið. Tí verður mett, at inflasjónin í Norðurlondum verður hægri í 2008 enn hon hevur verið í 2007 og 2006, sí talvu 3.2.

Samanumtikð er støðan á gjaldsjavnunum og almennu búskettunum[3] í Norðurlondum góð, sí talvu 3.3. Ísland hevur tó stórt hall á gjaldsjavnanum, meðan stóru oljuinntøkurnar í Noregi geva landinum stórt avlop á gjaldssamskiftinum við útheimin. Í Finnlandi og Svøríki eru avlopini á gjaldsjavnunum eisini stór. Samanborið við fleiri Evrulond, hava Norðurlond stór avlop á almennu búskettunum. Henda gongdin heldur væntandi fram næsta ár, Ísland undantikið.

**Talva 3.1: Árligur BTÚ-vøkstur í evru- og norðanlondum**

| *BTÚ-vøkstur í %* | **2004** | **2005** | **2006** | **2007** | **2008** |
|---|---|---|---|---|---|
| Evrulondini | 2,0 | 1,4 | 2,7 | 2,6 | 2,5 |
| Norðurlond | 3,7 | 3,3 | 4,4 | 3,2 | 2,5 |
| -Svøríki | 4,1 | 2,9 | 4,4 | 3,7 | 3,3 |
| -Finnland | 3,7 | 2,9 | 5,5 | 3,1 | 2,7 |
| -Noreg | 4,4 | 4,5 | 4,6 | 3,7 | 2,7 |
| -Ísland | 7,6 | 7,2 | 2,6 | 0,9 | 2,9 |
| -Danmørk | 2,1 | 3,1 | 3,2 | 2,2 | 1,2 |

Kelda: Norðurlandaráðið og ES-nevndin.

**Talva 3.2: Arbeiðsloysið og inflasjón í %**

| | Arbeiðsloysið | | | Inflasjón | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | **2006** | **2007** | **2008** | **2006** | **2007** | **2008** |
| Evrulondini | 7,9 | 7,3 | 6,9 | 2,2 | 1,9 | 1,9 |
| Norðanlondini | 6,1 | 5,1 | 5,0 | 1,8 | 1,6 | 2,0 |
| -Svøríki | - | 6,7 | 6,2 | 1,5 | 1,2 | 1,9 |
| -Finnland | 7,7 | 7,2 | 6,8 | 1,3 | 1,7 | 1,7 |
| -Noreg | 3,4 | 2,5 | 2,7 | 2,5 | 1,8 | 1,7 |
| -Ísland | 1,3 | 1,8 | 3,2 | 6,8 | 3,6 | 2,5 |
| -Danmørk | 4,3 | 3,6 | 3,7 | 1,9 | 1,9 | 2,4 |

Kelda: Norðurlandaráðið.

[3] Almenna búsketti er land og kommunur.

**Talva 3.3: Gjaldsjavni og búskettavlop í % av BTÚ**

| | Gjaldsjavni | | | Alment búskettavlop | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | **2006** | **2007** | **2008** | **2006** | **2007** | **2008** |
| Svøríki | 7,2 | 7,8 | 7,8 | 2,1 | 2,3 | 2,2 |
| Finnland | 5,9 | 6,1 | 5,8 | 3,9 | 3,7 | 3,6 |
| Noreg | 16,7 | 12,9 | - | 18,2 | 15,5 | - |
| Ísland | -26,7 | -15,8 | -9,9 | 5,3 | 2,0 | -2,2 |
| Danmørk | 2,4 | 1,7 | 1,6 | 4,2 | 4,2 | 3,3 |

Kelda: Norðurlandaráðið.

Vøksturin í **svenska** búskapinum minkar nakað í 2007 og 2008, men vøksturin verður framvegis stórur. Svenski útflutningurin veksur, men útflutningurin fer at verða nakað tálmaður av at svenska krónan styrknar. Íløguhugurin er framvegis stórur, men vøksturin í íløgunum fer neyvan at verða líka stórur sum hann hevur verið. Vaksandi virksemi og minkandi arbeiðsloysi hevur við sær stóran vøkstur í tøku inntøkuni hjá svensku løntakarunum. Privata nýtslan fer tí at vaksa nógv. Arbeiðsútboðið er nógv vaksið í 2007 og fer framvegis at vaksa nakað í 2008. Orsøkin er bygnaðarligar broytingar á arbeiðsmarknaðinum, har arbeiðsleys nú í nógv størri mun verða noydd at søkja og bjóða seg fram á arbeiðsmarknaðinum. Inflasjónin er lág, men stóri eftirspurningurin eftir arbeiðsmegi leggur trýst á lønarlagið. Lønir og inflasjón fara tí at hækka í 2008 og 2009. Avlopið á almenna búskettinum verður umleið 2% av BTÚ í 2007 og 2008.

Stórur vøkstur var í **danska** búskapinum fyrra hálvár í 2006, fyri alt árið var BTÚ-vøksturin 3,2%. Vøksturin stavar bæði frá innlendskum eftirspurningi og vøkstri í útflutninginum. Privatu íløgurnar vuksu 13%, meðan bústaðar- og almennu íløgurnar vuksu 7-8%. Vøksturin í privatu nýtsluni er grundaður á vaksandi frívirði í bústøðum, sum fer til privata nýtslu. Hóast arbeiðsloysið er lítið, hevur lønarvøksturin ikki verið stórur. Vandi er tó fyri lønarvøkstri, nú arbeiðsloysið fer niður um 4%. Lága inflasjónin verður tí nakað hægri í 2008. Forsøgnirnar fyri privatu nýtsluna eru framvegis góðar, men stígur er nú komin í bústaðarmarknaðin og stóri prísvøksturin seinastu árini er nú steðgaður. Avlopið á almenna búskettinum verður 4,2% av BTÚ í 2007 og 3,3% í 2008.

Árligi BTÚ-vøksturin í **Noregi** hevur verið omanfyri 4% frá 2004 til 2006. Í 2006 kom arbeiðsloysið niður á 3,4%. Arbeiðsútboðið vaks 3%, men vøksturin í produktivitetinum minkaði. Privata nýtslan vaks 4% og vøksturin í privatu nýtsluni hevur eisini verið stórur í 2007. Manglandi arbeiðsmegi trýstir lønirnar uppeftir í 2007 og 2008, men inflasjónin er lág, tí elprísirnir og prísirnir á fleiri innfluttum vørum eru falnir. Virksemið er stórt og veksur framvegis, serliga í oljuvinnuni. Avlopið á almenna buskettinum liggur um 15% av BTÚ. Tað eru stóru oljuinntøkurnar, sum eru orsøkin til stóra avlopið, samanborið við hini Norðurlondini.

Vøksturin í **finsku** bruttotjóðarúrtøkuni var omanfyri 5,5% í 2006. Vøksturin minkaði tó nakað seinna hálvárið. Vøksturin er grundaður á altjóða hákonjunkturin og hann sæst aftur á øllum økjum í finska búskapinum. Vøksturin er minni í ár, men ein BTÚ-vøkstur á góð 3% er framvegis ein stórur vøkstur. Skattalættar og lág renta hava stimbrað innlendska eftirspurningin samstundis sum brúkarar og vinna hava góðar vónir um framtíðina. Finski búskapurin er nú á toppinum í hákonjunkturinum og manglandi arbeiðsmegi avmarkar vøksturin í framleiðsluni. Arbeiðsloysið minkar støðugt og fer niður um 7% næsta ár. Bygnaðarligir trupulleikar eru á arbeiðsmarknaðinum, tí útboð og eftirspurningur eftir arbeiðsmegi passa ikki saman. Hóast lønarvøksturin hevur verið lítil hækkar inflasjónin. Brúkaraprísirnir vaksa væntandi umleið 2% í ár. Avlopið á almenna búskettinum verður 3,7% av BTÚ í ár og 3,6% í 2008.

Stórar orkuverkætlanir skaptu stóran vøkstur í **íslendsku** bruttotjóðarúrtøkuni frá 2003 til 2006. Orkuverkætlarnirnar eru nú um at verða lidnar og tað sæst aftur í minni vøkstri í íslendsku bruttotjóðarúrtøkuni. Tað eru eisini onnur viðurskifti, sum hava ávirkað gongdina í íslendska búskapinum, t.d. nýggir lánimøguleikar á bústaðarmarknaðinum og virðisbrøv í íslendskum krónum á altjóða marknaðinum. Stórur vøkstur var í bústaðarprísunum fram til 2005. Hetta økti nógv um keypiorkuna hjá íslendsku brúkarunum, samstundis sum lánimøguleikarnir vóru góðir og innflutningsprísirnir lágir, tí íslendska krónan var sterk. Ójavnin í íslendska uttanríkishandlinum gjørdist tí enn størri enn hann var frammanundan. Hallið á

íslendska gjaldsjavnanum verður væntandi umleið 16% av BTÚ í ár og umleið 10% í 2008. Avlopið á almenna búskettinum verður 2% av BTÚ í ár, sum vendur til eitt hall á góð 2% í 2008.

## 3.3 Útlitini fyri altjóða búskapin

Til fyri stuttari tíð síðan varð mett, at stóri vøksturin í altjóða búskapinum fór at halda sær eina tíð enn, men ófriðurin á fíggjarmarknaðunum seinastu tíðina hevur sátt iva um støðuna í altjóða búskapinum, serliga í USA. Nýggjastu tølini fyri amerikanska arbeiðsmarknaðin kunnu vera tekin um, at kreppan á amerikanska bústaðarmarknaðinum er álvarsligari enn fyrst var hildið.

Miðbankarnir í Evropa og USA hava fyribils slept inflasjónstálmandi rentu-politikkinum og evropeiski miðbankin avgjørdi tí at lata rentuna vera óbroytta á seinasta rentufundinum í september, meðan amerikanski miðbankin avgjørdi at lækka rentuna. Ivasamt er nú, hvussu rentupolitikkurin verður í nærmastu framtíð.

Í Norðurlondum hevur vøksturin verið nakað hægri enn í Evrulondunum, men her er manglandi arbeiðsmegi ein forðing afturat fyri framhaldandi vøkstri. Vøksturin í Norðurlondum verður tí mettur at fara at minka niður á sama støðið sum í Evrulondunum í 2008.

Búskaparliga gongdin næstu mánaðirnar verður rættiliga avgerandi fyri metingar-nar um gongdina í altjóða búskapinum í 2008.

# 4. FØROYSKI BÚSKAPURIN

Støðan og gongdin í føroyska búskapinum verður lýst við tí vitan og hagtølum, ið vóru tøk í september 2007. Grundarlagið er m.a. feskastu hagtølini, ið staðfesta gongdina í seinastuni umframt konjunkturbarometrið[4] hjá Fíggjarmálaráðnum.

## 4.1 Gongdin í samlaða virkseminum

Búskaparliga gongdin verður vanliga lýst við at vísa gongdina í bruttotjóðarúrtøkuni, BTÚ, men av tí at føroyska bruttotjóðarúrtøkan ikki er gjørd upp í føstum prísum og leypandi uppgerðin heldur ikki er dagførd, er gongdin í føroysku bruttotjóðarúrtøkuni ikki serliga nýtiligt mát til at vísa gongdina í búskapinum.

Tað finnast harafturímóti sera góðar og dagførdar skrásetingar av lønarútgjaldingunum í Føroyum. Lønarútgjaldingarnar svara til yvir helmingin av BTÚ, og gongdin í lønarútgjaldingunum umvegis a-skattaskipanina geva tí eina góða ábending um gongdina í virkseminum í føroyska búskapinum.

Rættilig ferð kom á føroyska búskapin í fjør og ferðin er vaksin enn meira í ár, sí talvu 4.1 og mynd 4.1. Fyrstu 8 mánaðirnar í ár var vøksturin í lønarútgjaldingunum umvegis a-skattaskipanina 8,2% samanborið við somu tíð í fjør. Lønarvøksturin er nú hægri enn síðst í 1990-árunum, men nakað minni enn fyrstu árini í hesi øldini.

**Talva 4.1: Vøkstur í lønarútgjaldingum, januar-august**

| *Vøkstur í %* | **2000** | **2001** | **2002** | **2003** | **2004** | **2005** | **2006** | **2007** |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Vøkstur í lønarútgjaldingum | 10,1 | 12,2 | 6,3 | 0,9 | 3,1 | 2,1 | 6,6 | 8,2 |

[4] Konjunkturbarometrið er á heimasíðuni hjá Fíggjarmálaráðnum: www.fmr.fo

**Mynd 4.1: Lønarútgjaldingar umvegis a-skattaskipanina, 1997-2007**




Tað er tó stórur munur á gongdini í lønarútgjaldingunum í ymisku vinnugreinunum, sí talvu 4.2.

**Talva 4.2: Lønargjaldingar skiftar á vinnugrein, 2002-2006**

| *Mió. kr.* | **2002** | **2003** | **2004** | **2005** | **2006** |
|---|---|---|---|---|---|
| Landbúnaður | 6,5 | 6,5 | 7,3 | 8,0 | 9,6 |
| Fiskiskapur | 1.009,7 | 874,2 | 777,2 | 838,4 | 950,5 |
| Ali- og kryvjivirki | 160,4 | 128,7 | 91,6 | 60,0 | 91,5 |
| Ráevnisvinna | 19,1 | 18,7 | 19,5 | 21,8 | 24,7 |
| Fiskavøruídnaður | 412,5 | 410,7 | 396,3 | 380,2 | 362,3 |
| Skipasmiðjur og smiðjur | 130,1 | 130,9 | 124,7 | 130,6 | 145,0 |
| Ídnaður annars | 219,0 | 223,9 | 218,6 | 223,4 | 230,8 |
| Bygging | 342,0 | 344,3 | 380,6 | 377,3 | 436,7 |
| Orkuveiting | 46,7 | 46,3 | 50,3 | 47,2 | 47,7 |
| Handil og umvæling | 568,1 | 588,5 | 596,2 | 585,2 | 627,5 |
| Gistihús og matstovur | 62,6 | 70,6 | 70,1 | 69,7 | 75,7 |
| Sjóflutningur | 198,9 | 210,6 | 222,1 | 228,7 | 225,8 |
| Flutningur annars | 145,9 | 141,0 | 146,1 | 155,5 | 181,9 |
| Postur og fjarskifti | 156,4 | 161,9 | 165,1 | 163,2 | 168,1 |
| Fígging og trygging | 222,8 | 224,9 | 237,7 | 245,8 | 285,9 |
| Vinnuligar tænastur | 160,0 | 178,6 | 193,0 | 207,1 | 235,1 |
| Húshaldstænastur | 36,0 | 36,5 | 40,2 | 42,4 | 46,7 |
| Almenn fyrisiting og tænastur | 1.737,0 | 1.839,2 | 2.002,6 | 2.088,5 | 2.141,2 |
| Felagsskapir og mentan | 102,1 | 147,5 | 118,7 | 128,1 | 133,7 |
| Ótilskilað vinna | 1,0 | 1,0 | 3,5 | 3,7 | 3,7 |
| **Tilsamans** | **5.736,6** | **5.784,6** | **5.861,3** | **6.004,8** | **6.423,8** |

Kelda: Hagstova Føroya

Fyri at lýsa hvønn týdning ymisku vinnurnar hava fyri búskaparligu gongdina, kunnu vinnugreinarnar býtast upp í 4 høvuðsbólkar, sum eru tilfeingisvinna, vinnur innan vøruframleiðslu, privatar tænastur og almennar tænastur.

*Tilfeingisvinna* er landbúnaður, fiskiskapur, ali- og kryvjivirki og ráevnisvinna. *Vinnur innan vøruframleiðslu* eru fiskavøruídnaður, skipasmiðjur, aðrar smiðjur, ídnaður annars, byggivinna og orkuveiting. *Privatar tænastuvinnur* eru handil og umvæling, gistingarhús og matstovur, sjóflutningur og flutningur annars, postur og fjarskifti, fígging og trygging, vinnuligar tænastur, húshaldstænastur, felagskapir og mentan og ótilskilað vinna. *Almennar tænastur* eru almenn fyrisiting, allar almennar tænastur og alt annað virksemi, sum tað almenna fíggjar við sínum lønarúteiðslum.

Almennar og privatar tænastur eru vorðnar ein størri partur av føroyska búskapinum seinastu árini, sí talvu 4.3. Í 2002 vóru tær 59,1% og í 2006 vóru tær 64,2% av samlaðu lønargjaldingunum. Tænastuvinnurnar verða tí ein lutfalsliga størri partur av føroyska búskapinum, meðan tilfeingis- og framleiðsluvinnurnar minka. Hetta er sama gongdin sum í okkara grannalondum og flestu londunum í vesturheiminum.

**Talva 4.3: Býti av lønargjaldingum á høvuðsbólkar, 2002-2007**

| *%-býti* | **2002** | **2003** | **2004** | **2005** | **2006** | **2007** *jan.-jun.* |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tilfeingisvinnur | 20,8 | 17,8 | 15,3 | 15,5 | 16,8 | 16,7 |
| Vøruframleiðsla | 20,1 | 20,0 | 20,0 | 19,3 | 19,0 | 18,5 |
| Tænastuvinnur | 28,8 | 30,4 | 30,6 | 30,5 | 30,9 | 31,3 |
| Almennar tænastur | 30,3 | 31,8 | 34,2 | 34,8 | 33,3 | 33,6 |
| Tilsamans | 100,0 | 100,0 | 100,0 | 100,0 | 100,0 | 100,0 |

Kelda: Hagstova Føroya

Lønargjaldingarnar í tilfeingisvinnunum minka fram til 2005 og eru síðani farnar at vaksa aftur. Tað eru serliga lønirnar í fiskiskapi og lønirnar í ali- og kryvjivirki, sum standa fyri vøkstrinum. Gongdin í lønargjaldingunum innan vøruframleiðslu frá 2002 til nú hevur verið, at lønargjaldingarnar innan fiskavøruídnað eru minkaðar alt tíðarskeiðið, meðan vøkstur hevur verið í lønargjaldingunum í øllum

hinum vinnunum í høvuðsbólkinum vøruframleiðsla. Tað eru ikki stórvegis broytingar í lønargjaldingunum í almennu og privatu tænastuvinnunum.

Fyrstu 8 mánaðirnar í ár eru lønargjaldingarnar meira enn 8% hægri enn somu tíð í 2006. Størsti vøksturin er í alivinnuni, sum vaks 34% ella 18 mió. kr. Almennar tænastur vaksa 100 mió. kr., fiskiskapur veksur 40 mió. kr. og handil og umvæling vaksa 35 mió. kr. Einasta vinnugrein, har tað kann staðfestast ein minking í lønargjaldingunum, er vinnugreinin fiskavøruídnaður, har tað vórðu goldnar 5 mió. kr. ella 2,2% minni í lønum fyrstu 8 mánaðirnar í ár samanborið við somu tíð í fjør.

## 4.2 Gongdin í privata vinnulívinum

Fyrstu 7 mánaðirnar í ár vórðu avreidd góð 71.600 tons av fiski um avreiðingarskipanina. Hetta eru góð 6.800 tons ella 9% minni enn somu tíð í fjør. Tað er minni avreitt av øllum fiskasløgum, men tað er serliga nøgdin av botnfiski sum dregur niður. Nøgdin av botnfiski minkaði góð 5.600 tons. Toskur, hýsa og upsi minkaðu ávíkavist 10%, 21% og 3%.

Virðið á veiðini minkaði ikki líka nógv sum nøgdin. Fyrstu 7 mánaðirnar í ár minkaði virðið á avreiddu veiðuni 17 mió. kr. samanborið við somu tíð í fjør. Hetta svarar til eina virðisminking á 2,4%.

Toskastovnurin er illa fyri, tí er toskafiskiskapurin nógv minkaður í seinastuni. Fiskirannsóknarstovan veit ikki um, at gýtingarstovnurin av toski á landgrunninum nakrantíð fyrr hevur verið so illa fyri sum hann er nú. Gýtingarstovnarnir av upsa og hýsu eru harafturímóti væl fyri og tola tann fiskiskap, sum hevur verið seinnu árini.

Stovnurin av toski á Føroya Banka er mettur á sama støði sum seinast í 1980-árunum og fyrra partin av 1990-árunum, tá bankin varð stongdur fyri allari veiðu. Fiskirannsóknarstovan mælti tí í juni í ár landsstýrinum til at skerja fiskidagarnar við 40%. Løgtingið samtykti at skerja fiskidagatalið við 2% umframt at friða ávís øki fyri fiskiskap og aðrar avmarkingar í 2007.

Fiskivinnan á landi hevur givið hall seinastu árini. Ein av orsøkunum til vánaligu úrslitini hjá fiskavirkjunum á landi er rávørutilgongdin, sum er nógv versnað seinastu tíðina. Tilgongdin av toski og hýsu er nógv minkað og tí er kappingin um hesi fiskasløgini hørð. Nøgdirnar av upsa hava harafturímóti verið nøktandi, men upsaframleiðslan kastar ikki so nógv av sær. Ein annar stórur trupulleiki hjá fiskivinnuni á landi er manglandi arbeiðsmegi.

Í alivinnuni gongur betur. Hallið hjá alivinnuni á næstan 25 mió. kr. í 2005 vendi til eitt avlop á 105 mió. kr. í 2006. Góðir prísir er størsta orsøkin til góðu úrslitini, men sjúkufyribyrging, bygnaðarligar broytingar og tillagingar er eisini ein týðandi orsøk til, at alivinnan er komin fyri seg aftur.

Heldur prísurin sær, so fer alivinnan at flyta út fyri meira enn 600 mió. kr. í ár. Tað merkir, at alivinnan aftur er við at gerast ein av stóru føroysku útflutningsvinnunum. Í 1999 var útflutningsvirðið hjá alivinnnuni næstan 30% av samlaða føroyska útflutningsvirðinum, í 2005 var tað 13%, í ár verður tað væntandi 18% og í 2008 verður tað væntandi millum 20% og 25%.

Stór framgongd hevur verið í virkseminum í byggivinnuni seinasta árið. Arbeiðstørvurin er framvegis stórur í byggivinnuni og ordrabøkurnar eru fullar langt fram í tíðina. Manglandi arbeiðsmegi avmarkar virksemi í byggivinnuni, men bíleggingarnar vóru færri í summar enn tær vóru í byrjanini av árinum. Tað er tí ikki rúm fyri meira vøkstri í byggivinnuni, sum umstøðurnar eru í løtuni. Hetta leggur trýst á prís- og lønarlagið í byggivinnuni.

Vøksturin í handilsvinnuni hevur verið stórur, men handilsvinnan metir ikki, at vøksturin fer at halda fram við somu ferð. Arbeiðstørvurin er framvegis stórur í handilsvinnuni. Í tænastuvinnuni er framvegis stórur vøkstur og tænastuvinnan væntar, at arbeiðstørvurin fer at økjast enn meira í nærmastu framtíð.

## 4.3 Gongdin í privata húsarhaldinum

Vøksturin í føroysku privatnýtsluni var metstórur í 2006. Hetta sæst aftur í avgjaldsinntøkum landskassans, sum fyri alt árið 2006 vóru umleið 20% hægri enn í 2005, sí mynd 4.2. Tað vóru serliga meirvirðisgjalds- og skrásetingargjalds-inntøkurnar, sum vuksu nógv. Vøksturin er minkaður nakað í ár, men hann er framvegis stórur.

**Mynd 4.2: Avgjaldsinntøkur landskassans, 1997-2007**




Stóri vøksturin í nýtsluni er grundaður á stóran vøkstur í virkseminum á øllum økjum í føroyska samfelagnum. Harumframt var ein týðandi orsøk til bráð-vøksturin í privatu nýtsluni í 2006, nýggir og lagaligir fíggingarhættir til bústaðir, sum føroysku peningastovnarnir fóru at bjóða sínum viðskiftafólkum í fjør.

Nýggju fíggingartilboðini til bústaðir komu samstundis sum sethúsaprísirnir vóru í stórum vøkstri. Síðani 1995 hevur árligi vøksturin í sethúsaprísunum verið stórur. Hetta kemst m.a. av vaksandi realløn, lækkandi rentu og nógv størri eftirspurningi enn útboði, serliga í høvuðsstaðnum.

Lagaligu tilboðini um bústaðarfígging hava økt sethúsaprísirnar munandi seinastu tvey árini, sí mynd 4.3. Sethúsaprísirnir í Havnini og í størri bygdunum vóru

hægri 1. ársfjórðing í ár, men eru síðan lækkaðir aftur. Hetta kann vera tekin um, at sethúsaprísirnir hava verið í hæddini og ikki fara at halda fram at vaksa fyribils. Í smærru bygdunum hildu sethúsaprísirnir tó fram at vaksa 2. ársfjórðing í ár.

**Mynd 4.3: Gongdin í sethúsaprísunum 2.ársfjórðing, 1987-2007**




Kelda: Føroya Sparikassi.

Sambært konjunkturbarometrinum er ikki líkt til at føroyski brúkarin fer at økja nýtsluna enn meira í nærmastu framtíð, heldur tvørtur ímóti. Eftirspurningurin eftir húsum, bilum og øðrum drúgvum nýtslutólum verður stórt sæð óbroyttur komandi árið, møguliga eitt lítið vet minni. Tey eru eitt lítið vet fleiri, sum ætla at nýta størri upphæddir til bústaðarábøtur næsta árið, men tey eru eisini eitt sindur fleiri, sum ikki ætla sær at fremja størri keyp, men heldur økja um samansparingina.

## 4.4 Gongdin í almenna búskapinum

Hall hevur verið á almenna búskettinum[5] seinastu árini, sí talvu 4.4. Tølini skulu takast við fyrivarni, tí kommunurnar hava ongar felags roknskaparreglur ella –skipan, og kommunutølini fyri 2006 eru heldur ikki endalig roknskapartøl.

[5] Almenna búskettið verður sambært nýggjum altjóða ásetingum lýst sum land og kommunur.

Útlutingar- og einskiljingarinntøkur frá almennum partafeløgum eru heldur ikki tiknar við í inntøkurnar hjá landinum.

Hallið á almenna búskettinum er minkað nógv frá 2004 til 2006, men í 2006 veksur hallið aftur. Hallið veksur aftur í 2006, hóast stóran vøkstur í virkseminum í føroyska búskapinum og metstóran vøkstur í avgjaldsinntøkum landskassans hetta árið.

**Talva 4.4: Gongdin í almenna búskapinum, 2003-2007**

| *mió. kr.* | **2003** | **2004** | **2005** | **2006** | **2007** |
|---|---|---|---|---|---|
| **Inntøkur tilsamans** | **4.591** | **4.590** | **4.614** | **5.131** | **5.430** |
| -Landsskattur og avgjøld | 2.860 | 2.840 | 2.897 | 3.222 | 3.535 |
| -Ríkisveiting o.t. | 632 | 633 | 631 | 635 | 635 |
| -Kommunuskattur | 1.099 | 1.117 | 1.086 | 1.274 | 1.260 |
| | | | | | |
| **Útreiðslur tilsamans** | **4.557** | **4.765** | **4.814** | **5.136** | **5.582** |
| -Rakstur hjá landinum | 3.194 | 3.323 | 3.467 | 3.567 | 3.852 |
| -Rakstur hjá kommununum | 751 | 783 | 791 | 899 | 948 |
| -Løgur hjá landinum | 262 | 228 | 201 | 258 | 278 |
| -Løgur hjá kommununum | 236 | 343 | 264 | 395 | 473 |
| -Rentur hjá landinum | 90 | 72 | 71 | 7 | 8 |
| -Rentur hjá kommununum | 24 | 16 | 20 | 10 | 23 |
| | | | | | |
| **Úrslit** | **34** | **-175** | **-200** | **-5** | **-152** |

Kelda: Fíggjarmálaráðið og Innlendismálaráðið.

Stórur vøkstur var í kommunalu inntøkunum í 2006, men í 2007 er búsketterað við nakað minni skattainntøkum. Stóri vøksturin í kommunalu skattainntøkunum í 2006 kom av stórari ferð í búskapinum og at skattaprosentið hækkaði í flestu kommununum, sí talvu 4.5. Lægsta skattaprosentið í landinum er 16% og hægsta skattaprosentið er 23,5%.

Í 2007 búskettera kommunurnar við einum vøkstri í rakstrarútreiðslunum upp á 49 mió. kr., sum svarar til 5,5% og einum vøkstri í løguútreiðslunum upp á 78 mió. kr., sum svarar til 19,7%. Ein orsøk til útreiðsluvøksturin hjá kommununum seinastu árini er, at nøkur málsøki eru løgd út til kommunurnar at umsita.

**Talva 4.5: Kommunuskattaprosent**

| | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 |
|---|---|---|---|---|---|
| Allar kommunur í miðal | 19,45 | 19,51 | 19,61 | 20,61 | 20,65 |
| Tórshavn | 18,75 | 18,75 | 18,75 | 19,75 | 19,75 |
| Klaksvík | 20,00 | 20,00 | 20,00 | 20,00 | 20,75 |
| Runavík | 19,95 | 19,95 | 19,95 | 21,50 | 22,00 |
| Tvøroyri | 22,50 | 22,50 | 22,50 | 23,50 | 23,50 |
| Stórar kommunur í miðal | 20,30 | 20,18 | 20,49 | 21,38 | 21,50 |

Kelda: Toll- og skattstova Føroya.

## 4.5 Gongdin í fólkatalinum

Seinastu 17 árini er fólkatalið í Føroyum vaksið við 580 fólkum ella 1,2%, men landafrøðiliga býtið er rættiliga ymiskt, sí talvu 4.6. Fólkatalið í stóru oyggjunum, Streymoy og Eysturoy, er vaksið. Í Norðoyggjum og sunnanfjørðs er fólkatalið harafturímóti minkað hesi 17 árini.

Fyrsta august í ár búðu 48.584 fólk í Føroyum. Hetta eru 128 fleiri enn fyri einum ári síðani. Verður gongdin tann sama sum seinastu trý árini, fer fólkatalið at minka aftur út á heystið, tá nógv fráflyting vanliga er. Flytingin hevur altíð ávirkað fólkatalið nógv, men serliga aftan á 2004, tá heimafturflytingin var av, er tað árliga flytimynstrið farið at síggjast aftur sum sveiggj í fólkatalinum.

**Talva 4.6: Gongdin í fólkatalinum býtt á sýslur, 1990-2007**

| *1. januar* | 1990 | 1996 | 2000 | 2006 | 2007 |
|---|---|---|---|---|---|
| Norðoya sýsla | 6.148 | 5.614 | 5.810 | 5.989 | 5.980 |
| Eysturoyar sýsla | 10.533 | 9.349 | 9.995 | 10.731 | 10.810 |
| Streymoyar sýsla | 20.549 | 19.167 | 20.531 | 22.146 | 22.188 |
| Vága sýsla | 2.947 | 2.604 | 2.614 | 2.932 | 2.968 |
| Sandoyar sýsla | 1.757 | 1.514 | 1.445 | 1.442 | 1.464 |
| Suðuroyar sýsla | 5.836 | 5.080 | 4.958 | 4.943 | 4.940 |
| Alt landið | 47.770 | 43.328 | 45.353 | 48.183 | 48.350 |

Kelda: Hagstova Føroya

Árenn kreppuna í nítiárunum var tann árligi fólkavøksturin út við 600 fólk. Frá tí at fólkatalið fór at minka í 1989 og til tað aftur fór at vaksa í 1995, minkaði fólkatalið í miðal við meira enn 800 fólkum um árið. Í tíðarskeiðnum 1995 til

2003 var tann árligi vøksturin væl oman fyri 600 fólk. Men aftan á 2004 hevur miðalvøksturin verið minni enn 50 fólk um árið.

Nettotilflytingin verður eftir øllum at døma negativ í ár, sí talvu 4.7. Nettotilflytingin fyrra hálvár í ár var -30 samanborið við 105 sama tíðarskeið í fjør. Av tí at fráflytingin altíð er størri seinna hálvár, verður nettotilflytingin fyri alt árið í ár negativ. Aldursbýtið á teimum, sum flyta er øðrvísi enn aldursbýtið á teimum, sum búgva í Føroyum. Í Føroyum er níggjundi hvør íbúgvi í aldursbólkinum 20-29 ár, men millum teirra, ið flyta millum Føroyar og útlond, er meira enn triði hvør í hesum aldursbólki.

**Talva 4.7: Nettotilflytingin til Føroyar, 2004-2007**

| *fólk* | **2004** | **2005** | **2006** | **2007** fyrra hálvár |
|---|---|---|---|---|
| Flutt til Føroyar | 1.585 | 1.671 | 1.568 | 550 |
| Flutt úr Føroyum | 1.419 | 1.222 | 1.483 | 580 |
| Nettotilflyting | 166 | 449 | 85 | -30 |

Kelda: Hagstova Føroya

## 4.6 Gongdin í arbeiðsloysinum

Arbeiðsloysið hevur nú verið í støðugari minking í nærum hálvt triðja ár, eftir at rákið vendi í februar 2005. Síðan februar 2007 er tað søguliga metið sett hvønn mánað. Arbeiðsloysið er nú so lítið, at tað eisini í altjóða høpi er óvanliga lágt. Í juli í ár var arbeiðsloysið 1,4% av arbeiðsfjøldini. Bert hendingar ferð kemur fyri, at lond kunngera arbeiðsloysistøl lægri enn 2%.

**Talva 4.8 Gongdin í arbeiðsloysinum, 2002-2006**

| | **2002** | **2003** | **2004** | **2005** | **2006** |
|---|---|---|---|---|---|
| Tal av skrásettum | 679 | 750 | 1.105 | 1.212 | 876 |
| Tal av fulltíðararbeiðsleysum | 596 | 664 | 960 | 1.052 | 765 |
| Arbeiðsfjøld | 25.939 | 26.617 | 27.128 | 27.460 | 28.277 |
| Arbeiðsleys í % av arbeiðsfjøld | 2,3 | 2,5 | 3,5 | 3,8 | 2,7 |
| Árstíðarjavnað arbeiðsloysis-% | 2,3 | 2,5 | 3,5 | 3,8 | 2,7 |

Kelda: Hagstova Føroya

Arbeiðsloysið hevur stórt sæð verið minkandi í øllum sýslum og øllum aldursbólkum. Arbeiðsloysið millum konufólk tykist tó at standa í stað ella vaksa eitt sindur. Hetta sæst serliga aftur í aldursbólkinum 35-44 ár um alt landið, tó í øllum aldursbólkum í Norðoya sýslu. Hjá mannfólki vístu juli tølini eina minking í mun til undanfarnu mánaðar í øllum aldursbólkum og øllum sýslum.

Seinasta árið hevur vøksturin í løntakarum verið størri enn vøksturin í fólkatalinum og eingin nettotilflyting er til landið. Hvaðani koma so hesir nýggju løntakararnir?

Tað er serliga tilgongdin av ungum løntakarum, sum er orsøk til stóra vøksturin í løntakaratalinum, men elsti aldursbólkurin ger eisini sítt til vøksturin. Tað er sostatt tilgongdin av teimum ungu undir 20 ár og teimum oman fyri 60 ára aldur, sum er keldan til vøksturin í løntakaratalinum. Hetta er ein skjótt tømd kelda av tilgongd til arbeiðsmarknaðin, so væntast kann ikki, at vøksturin heldur fram av hesum ávum. Størri nýggj tilgongd til arbeiðsmarknaðin kann hereftir bert koma uttaneftir.

## 4.7 Gongdin í brúkaraprístalinum

Brúkaraprístalið hækkaði 1,5% frá 1. ársfjórðingi til 2. ársfjórðing í ár. Seinasta árið er brúkaraprístalið hækkað 2,8%, sí talvu 4.9.

Tað er serliga størri býlisútreiðslur og hægri prísir á matvørum og bensin, sum hava togað brúkaraprístalið uppeftir frá 1. ársfjórðingi til 2. ársfjórðing í ár. Fyri býli samanlagt eru prísirnir farnir 4,4% upp. Rentan á íbúðalánum er hækkað 6%, húsaleiga 8,3% og brenniolja til húsarhald 6,5%. Prísurin á brennievni til motorakfør er hækkaður 8,3%. Prísvøksturin fyri matvørur samanlagt var 1,4% seinasta ársfjórðingin. Prísirnir eru farnir upp á flestu matvørubólkum, mest á eplum og grønmeti, kornvørum, fitievnum og kaffi. Tað er eisini vorðið dýrari at eta úti. Prísirnir á matstovuveitingum eru farnir 1,2% upp.

**Talva 4.9: Gongdin í brúkaraprístalinum, 2006 og 2007**

| | 2006 2. ársfj. | 2007 1. ársfj. | 2007 2. ársfj. | Vøkstur í % 1.-2. ársfj. 2007 | Vøkstur í % 2.-2. ársfj. 06-07 |
|---|---|---|---|---|---|
| **Brúkaraprístalið** | **106,2** | **107,5** | **109,1** | **1,5** | **2,8** |
| -Matur og drekka | 107,7 | 110,1 | 111,7 | 1,4 | 3,7 |
| -Rúsdrekka og tubbak | 114,3 | 115,4 | 115,7 | 0,2 | 1,2 |
| -Klædnavørur og fótbúnaður | 93,6 | 91,9 | 92,8 | 1,0 | -0,9 |
| -Býli | 101,8 | 106,8 | 111,5 | 4,4 | 9,6 |
| -Innbúgv, húsbúnaður o.l. | 99,6 | 99,5 | 99,4 | -0,1 | -0,3 |
| -Heilsa | 112,9 | 113,5 | 113,5 | -0,1 | 0,5 |
| -Flutningur | 116,0 | 114,0 | 116,1 | 1,9 | 0,1 |
| -Samskifti | 89,0 | 88,5 | 88,5 | 0,0 | -0,5 |
| -Frítíð og mentan | 105,3 | 104,4 | 104,2 | -0,1 | -1,0 |
| -Útbúgving | 101,2 | 112,8 | 112,8 | 0,0 | 11,4 |
| -Hotell og matveitarar | 115,2 | 117,7 | 118,9 | 1,0 | 3,3 |
| Ymiskar vørur og tænastur | 111,0 | 112,6 | 112,8 | 0,2 | 1,6 |

Kelda: Hagstova Føroya

2. ársfjórðing í ár vóru brúkaraprísirnir í miðal 2,8% hægri enn sama ársfjórðing í fjør. Hetta er sami prísvøkstur sum 1. ársfjórðing, tá prísirnir somuleiðis vóru 2,8% hægri enn 1. ársfjórðing í fjør. Tað eru serliga prísirnir fyri býli og matvørur, sum hava trýst brúkaraprístalið upp seinasta árið. Fyri býlið samanlagt hevur prísvøksturin verið 9,6% seinasta árið. Rentan á íbúðalánum er farin 32,8% upp og húsaleigan er hækkað 35,1%. Matvøruprísirnir hækkaðu 3,7% og brenniolju-prísirnir lækkaðu 7,4% 2. ársfjórðing í ár samanborið við sama ársfjórðing í fjør.

## 4.8 Gongdin í fíggjarsektorinum

Í ár vórðu teir stóru føroysku peningastovnarnir P/F Eik og P/F Føroya Banki skrásettir á virðisbrævamarknað. Hetta setir øðrvísi og strangari krøv til úrslitini hjá Eik og Føroya Banka, sum nú verða virðismettir og prísásettir á virðisbræva-marknaðunum dagliga.

Fyrstu hálvársroknskapirnir, eftir at peningastovnarnir vórðu skrásettir, vístu góð úrslit. Avlopið áðrenn skatt hjá Føroya Banka 1. hálvár 2007 var omanfyri 100 mió. kr. og bankin metir, at úrslitið fyri alt árið fer at liggja um 150 mió. kr. Hjá Eik var úrslitið fyrra hálvár 237 mió. kr. og bankin væntar at avlopið fyri alt árið

2007 verður umleið 340 mió. kr. áðrenn skatt. Samlaða úrslitið áðrenn skatt hjá Eik og Føroya Banka verður sostatt umleið 490 mió. kr. í 2007.

Talan er um stóran vøkstur, tí í 2003 var samlaða úrslitið hjá føroysku peningastovnunum eitt hall á 100 mió. kr. Tá høvdu peningastovnarnir stór tap og stórar burturleggingar til lán í alivinnuni. Síðan tá hevur stórur vøkstur verið í úrslitunum hjá peningastovnunum. Inntøkurnar eru vaksnar við øktum útlánsvirksemi á nærum øllum økjum, ómaksgjøldum, avkasti frá dótturfeløgum og partabrøvum.

## 4.9 Gongdin á handilsjavnanum

Frá 2002 til 2005 minkaði føroyska útflutningsvirðið 646 mió. kr., men vaks síðan aftur við 280 mió. kr. í 2006, sí talvu 4.10. Útflutningsvirðið er 8,6% lægri í 2006 samanborið við 2002. Innflutningsvirðið er harafturímóti vaksið øll hesi árini. Í 2006 var innflutningsvirðið 782 mió. kr. hægri enn í 2002.

Hetta sæst aftur í stórum handilsjavnahallið, sum var umleið 900 mió. kr. í 2005. Í 2005 stavar meginparturin av handilsjavnahallinum frá stórum skipakeypum. Í 2006 vóru skipakeyp minni parturin av handilsjavnahallinum, sum var nakað minni enn í 2005. Fyribils tølini fyri fyrstu 7 mánaðirnar í ár vísa, at handilsjavnahallið er økt aftur, tí innflutningurin veksur nógv meira enn útflutningsvirðið, sí talvu 4.11.

**Talva 4.10: Út- og innflutningur skiftur á høvuðsbólkar, 2002-2006**

| *Mió. kr.* | **2002** | **2003** | **2004** | **2005** | **2006** |
|---|---|---|---|---|---|
| **Útflutningur:** | | | | | |
| -Køldur fiskur | 1.477 | 1.288 | 1.185 | 1.026 | 1.019 |
| -Frystur fiskur | 1.580 | 1.368 | 1.194 | 1.334 | 1.519 |
| -Saltaður fiskur | 653 | 642 | 541 | 512 | 479 |
| -Royktur fiskur | 29 | 14 | 29 | 41 | 39 |
| -Turkaður fiskur | 220 | 238 | 364 | 350 | 475 |
| -Tilgjørdur niðursjóðaður fiskur | 127 | 109 | 83 | 54 | 34 |
| -Fiskur, onnur haldbúning | 74 | 104 | 81 | 50 | 74 |
| -Aðrar fiskavørur | 1 | 0 | 1 | 1 | 2 |
| -Skip | 61 | 139 | 189 | 195 | 76 |
| -Aðrar vørur | 12 | 9 | 23 | 25 | 151 |
| **Útflutningur tilsamans** | **4.234** | **3.912** | **3.690** | **3.588** | **3.868** |
| **Innflutningur:** | | | | | |
| -Til hav- og landbúnað | 276 | 297 | 220 | 102 | 121 |
| -Til byggivirki | 383 | 357 | 367 | 373 | 454 |
| -Til aðra framleiðslu | 790 | 757 | 695 | 717 | 865 |
| -Brennievni o.t. | 415 | 446 | 531 | 717 | 862 |
| -Maskinur og onnur útgerð | 441 | 475 | 376 | 363 | 506 |
| -Bilar og onnur flutningsfør | 260 | 229 | 210 | 225 | 339 |
| -Til beinleiðis nýtslu | 1.049 | 1.067 | 1.087 | 1.128 | 1.293 |
| -Skip, flogfør og tílíkt | 178 | 1.154 | 179 | 777 | 132 |
| -Rávøra til fiskavirking | 103 | 85 | 96 | 84 | 107 |
| **Innflutningur tilsamans** | **3.897** | **4.865** | **3.761** | **4.486** | **4.679** |
| **Handilsjavni** | **337** | **-953** | **-71** | **-898** | **-811** |

Kelda: Hagstova Føroya.

Fyrstu 7 mánaðirnar í ár var útflutningsvirðið á leið tað sama sum somu tíð í fjør. Samlaði útflutningurin var góðar 2,1 mia. kr. fyrstu 7 mánaðirnar í bæði 2006 og í 2007.

Av fiskaútflutninginum er tað serliga alifiskur, saman við uppisjóvarfiski og bólkinum øðrum fiski og fiskaúrdráttum, sum halda útflutningsvirðinum uppi. Tað er tó útflutningurin av skipum, sum ger størsta munin. Útflutningurin av skipum er 52 mió. kr. størri fyrstu 7 mánaðirnar í ár samanborið við somu tíð í fjør. Haraftur ímóti er útflutningsvirðið av botnfiski minkað 12% og flundrufiski 4%. Út-

flutningsvirðið av skeljafiski er minkað 42% og útflutningsvirðið av øðrum vørum er minkað 59%.

**Talva 4.11: Út- og innflutningur skiftur á høvuðsbólkar, 2006-2007**

| *Mió. kr.* | **2006** jan-jul | **2007** jan-jul | **Munur** | **í %** |
|---|---|---|---|---|
| **Útflutningur:** | | | | |
| -Køldur fiskur | 486 | 520 | 34 | 7 |
| -Frystur fiskur | 845 | 860 | 15 | 2 |
| -Saltaður fiskur | 283 | 228 | -55 | -19 |
| -Royktur fiskur | 26 | 20 | -6 | -25 |
| -Turkaður fiskur | 302 | 340 | 38 | 13 |
| -Tilgjørdur niðursjóðaður fiskur | 24 | 12 | -12 | -51 |
| -Fiskur, onnur haldbúning | 56 | 70 | 15 | 26 |
| -Aðrar fiskavørur | 1 | 1 | 0 | 0 |
| -Skip | 22 | 74 | 52 | 238 |
| -Aðrar vørur | 102 | 42 | -60 | -59 |
| **Útflutningur tilsamans** | **2.146** | **2.167** | **21** | **1** |
| | | | | |
| **Innflutningur:** | | | | |
| -Til hav- og landbúnað | 61 | 79 | 18 | 29 |
| -Til byggivirki | 259 | 322 | 63 | 24 |
| -Til aðra framleiðslu | 500 | 520 | 20 | 4 |
| -Brennievni o.t. | 570 | 489 | -81 | -14 |
| -Maskinur og onnur útgerð | 281 | 316 | 35 | 13 |
| -Bilar og onnur flutningsfør | 206 | 241 | 36 | 17 |
| -Til beinleiðis nýtslu | 713 | 777 | 64 | 9 |
| -Skip, flogfør og tílíkt | 18 | 201 | 183 | 1.027 |
| -Rávøra til fiskavirking | 80 | 37 | -43 | -54 |
| **Innflutningur tilsamans** | **2.688** | **2.983** | **294** | **11** |

Kelda: Hagstova Føroya.

Fyrstu 7 mánaðirnar í ár var innflutningurin 294 mió. kr. ella 11% hægri enn somu tíð í fjør. Meginparturin av vøkstrinum stava frá skipainnflutningi. Verða skipini ikki tald uppí var vøksturin í innflutninginum 4%.

Innflutningurin av brennievni var munandi lægri fyrstu 7 mánaðirnar í ár samanborið við somu tíð í fjør. Innflutningurin av brennievni minkaði 14%. Innflutningurin til beinleiðis nýtslu vaks 9%, Innflutningurin til vinnuliga nýtslu vaks 6% og innflutningurin av akførum, maskinum og útgerð vaks 15%.

Vøksturin í innflutninginum er minni nú enn hann hevur verið seinastu árini. Fyrstu 7 mánaðirnar í 2006 vaks innflutningurin 537 mió. kr. samanborið við sama tíðarskeið árið fyri. Í 2007 var vøksturin 295 mió. kr.

## 4.10 Framtíðarútlitini fyri føroyska búskapin

Øll hagtøl, metingar og amboð, sum eru tøk í løtuni, vísa, at stórt virksemið og nógv ferð er á føroyska búskapinum. Arbeiðsloysistølini hava verið metlág alt hetta árið og manglandi arbeiðsmegi er tí vorðin ein týðandi trupulleiki, sum virkar avmarkandi fyri framhaldandi vøkstri.

Alivinnan er við at koma fyri seg aftur og alivinnuna fer væntandi at standa fyri einum týðandi parti av føroyska útflutningsvirðinum komandi árini. Framtíðarútlitini fyri serliga toskafiskiskapinum eru minni góð. Toskafiskiskapurin er nógv minkaður seinastu árnini og fiskifrøðingar vita ikki um, at gýtingarstovnurin av toski á landgrunninum nakrantíð fyrr hevur verið so illa fyri sum hann er nú.

Stóri vøksturin í handils- og tænastuvinnum verður ikki líka stórur frameftir. Hetta sæst m.a. aftur við, at vøksturin í privata eftirspurninginum og vøksturin í innflutninginum er fallandi. Vøksturin er tó framvegis stórur.

# 5. FÍGGJARLÓGARUPPSKOTIÐ 2008

## 5.1 Búskaparpolitikkurin 2008

Í samgonguskjalinum er ásett, at fíggjarpolitikkurin skal lagast eftir búskaparligu fortreytunum í landinum og at avlop skal fáast aftur á fíggjarlógina. Avlopið á fíggjarlógaruppskotinum 2008 skal tí avmynda stóra virksemið í landinum.

Fyrstu árini hjá hesi samgonguni vórur búskaparligu fortreytirnar øðrvísi og tí varð búsketterað við halli á fíggjarlógaruppskotunum fyrstu árini í hesum samgonguskeiðnum, men í 2006 kom brádlig vend í búskapargongdina og nú er nógv ferð á føroyska búskapinum.

Ekspansivi og arbeiðsskapandi fíggjarpolitikkurin fyrstu árini av samgongu-skeiðnum hevur tænt sínum endamáli, men verður nú lagdur um, soleiðis at hann ikki longur stimbrar búskaparliga virksemið.

Manglandi arbeiðsmegin er eitt týðuligt tekin um at føroyski búskapurin ikki hevur orku við hesi ferðini framhaldandi. Ferðin má tí takast av búskapinum í eina tíð, annars verður úrslitið prísvøkstur og inflasjón, sum ikki er gagnligt fyri føroyska búskapin.

Í hesum fíggjarlógaruppskotinum er politisk semja millum samgonguflokkarnar um at minka um eftirspurningin í føroyska búskapinum við at økja um inntøkur og minka um útreiðslur landskassans.

Á inntøkusíðuni verður ætlaði skattalættin minkaður og nøkur punktgjøld og ómaksgjøld verða hækkaði. Á útreiðslusíðuni er løgukarmurin minkaður nakað fyri at tálma almenna byggivirksemi. Harumframt skulu allir landsstýrismenn, hvør í sínum lagi, spara 1% á rakstrarkarminum.

Raðfestingarnar fara serliga til umhvørvi, vælferð, gransking og skúla.

## 5.2 Úrslitið á fíggjarlógaruppskotinum 2008

RLÚ-avlop landskassans verður 176,6 mió. kr. í fíggjarlógaruppskotinum 2008, sí mynd 5.1. Hetta er væl størri enn úrslitið í ár, sum verður mett til 52 mió. kr. Her eru inntøkur frá einskiljingum av P/F Føroya Banka ikki tiknar við.

Politisk semja er um, at einskiljingarinntøkur ikki skulu takast við í dagliga raksturin og vanliga RLÚ-úrslit landskassans. Einskiljingarinntøkur verða skrásettar sum serinntøkur á fíggjarlóg og í landsroknskapi. Í 2006 vóru serinntøkurnar frá einskiljingum umleið 600 mió. kr. og í ár verða tær góðar 1,2 mia. kr. Hetta eru alt einskiljingarinntøkur frá P/F Føroya Banka.

**Mynd 5.1: RLÚ-úrslit landskassans, 2002-2008**




Viðm: Tølini fyri 2007 eru fyribils metingar, og tølini fyri 2008 eru úr fíggjarlógaruppskotinum. Tølini eru uttan einskiljingarinntøkur.

Talva 5.1 vísír vøksturin í inntøkum og útreiðslum landskassans frá 2002 til 2008.

**Talva 5.1: Vøkstur í inntøkum og útreiðslum landskassans, 2002-2008**

| *Vøkstur í %* | **2002** | **2003** | **2004** | **2005** | **2006** | **2007** | **2008** |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Inntøkur | -5,2 | -0,9 | -2,7 | 1,6 | 12,8 | 5,5 | 2,4 |
| Útreiðslur | 10,0 | 3,9 | 2,2 | 3,2 | 2,7 | 8,7 | 2,4 |

Viðm: Tølini fyri 2007 eru fyribils metingar, og tølini fyri 2008 eru úr fíggjarlógaruppskotinum.

## 5.3 Gongdin í inntøkum landskassans

Árligi miðalvøksturin í inntøkum landskassans hevur verið 3,6% frá 2002 til 2008, sí talvu 5.2. Inntøkur landskassans verða bólkaðar í 4 høvuðsbólkar. Samlaðu inntøkur landskassans minka í 2003 og 2004, men síðani kemur vøkstur í aftur inntøkurnar. Í 2006 var eitt rættiligt lop í inntøkum landskassans, tá inntøkuvøksturin var 8 ferðir só stórur sum árið frammanundan og meira enn dupult so stórur sum vøksturin í ár.

Stóri vøksturin í 2006 stavar bæði frá hægri skattainntøkum og hægri avgjaldsinntøkum. Samanlagt vaksa skatta- og avgjaldsinntøkurnar 397 mió. kr. í 2006. Vøksturin í skattainntøkunum er 172 mió. kr., ið svarar til 11,4% og vøksturin í avgjaldsinntøkunum er 225 mió. kr., ið svarar til 17%.

**Talva 5.2: Inntøkur landskassans, 2002-2008**

| *Mió. kr.* | **2002** | **2003** | **2004** | **2005** | **2006** | **2007** | **2008** |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Skattainntøkur | 1.675 | 1.581 | 1.539 | 1.508 | 1.680 | 1.776 | 1.857 |
| Avgjaldsinntøkur | 1.239 | 1.274 | 1.259 | 1.322 | 1.547 | 1.785 | 1.918 |
| Ymsar inntøkur | 58 | 81 | 41 | 67 | 120 | 28 | 40 |
| Heildarveiting o.t. | 629 | 632 | 633 | 631 | 632 | 635 | 635 |
| **Tilsamans** | **3.601** | **3.568** | **3.472** | **3.528** | **3.979** | **4.224** | **4.450** |

Viðm: Tølini fyri 2007 eru fyribils metingar, og tølini fyri 2008 eru úr fíggjarlógaruppskotinum.

Tað er framvegis stórur vøkstur í inntøkum landskassans, men vøksturin er ikki líka stórur sum bráðvøksturin í 2006. Tað eru serliga avgjaldsinntøkurnar, sum eisini í ár eru vaksnar nógv. Høvuðsorsøkin til bráðvøksturin í avgjaldsinntøkunum er nýggju fíggingartilboðini og kappingin millum føroysku peningastovnarnar, sum byrjaði síðst í 2005 og rættiliga kom í hæddina í 2006. Avgjaldsinntøkurnar fara tí ikki at vaksa við somu ferð í 2008, sum tær hava gjørt í 2006 og 2007.

Fyrsta og einasta einskiljingarverkætlanin hjá hesi samgonguni varð framd í summar, tá 2/3 av P/F Føroya Banka varð seldur á virðisbrævamarknaðinum. Í sambandi við einskiljingartilgongdina og einskiljingina av 2/3 av bankanum hevur landskassin higartil fingið umleið 600 mió. kr. fluttar í 2006 og góðar 1,2 mia. kr.

fluttar í 2007, men hesar inntøkur verða ikki skrásettar undir vanliga rakstrinum hjá landskassanum, og tí eru tær ikki tiknar við í talvu 5.2.

## 5.4 Gongdin í útreiðslum landskassans

Árligi miðalvøksturin í útreiðslum landskassans frá 2002 til 2008 hevur verið 3,8%. Í 2007 er vøksturin 8,7% og í 2008 verður vøksturin 2,4%, sí talvu 5.2 og 5.3. Nógv tann størsti parturin av útreiðslum landskassans eru rakstrarútreiðslur. Rentuútreiðslurnar eru vorðnar ein minni og minni partur á útreiðslusíðu landskassans.

Løguútreiðslurnar verða væl minni í 2008 enn í 2007. At minka løgurnar er eitt politiskt átak fyri at minka um almenna byggivirksemi og harvið tálma bráðvøkstrinum í búskapinum.

**Talva 5.3: Útreiðslur landskassans, 2002-2008**

| *Mió. kr. (netto)* | **2002** | **2003** | **2004** | **2005** | **2006** | **2007** | **2008** |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Rakstrarútreiðslur | 3.147 | 3.192 | 3.324 | 3.467 | 3.578 | 3.875 | 4.081 |
| Løguútreiðslur | 240 | 262 | 228 | 201 | 268 | 288 | 194 |
| Rentuútreiðslur | 24 | 91 | 72 | 71 | -7 | 9 | -2 |
| **Tilsamans** | **3.411** | **3.545** | **3.624** | **3.739** | **3.839** | **4.172** | **4.273** |

Viðm: Tølini fyri 2007 eru fyribils metingar, og tølini fyri 2008 eru úr fíggjarlógaruppskotinum.

Talva 5.4 vísir nettorakstrarútreiðslur landskassans býttar á greinar frá 2004 til 2008. Tølini skulu takast við fyrivarni, tí atlit eru ikki tikin at flytingum av málsøkjum millum ymsu greinarnar.

**Talva 5.4: Nettorakstrarútreiðslur landskassans, 2004-2008**

| *Mió. kr.* | | **2004** | **2005** | **2006** | **2007** | **2008** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| § 1 | Løgtingið | 33,5 | 35,2 | 34,6 | 40,0 | 41,4 |
| § 2 | Løgmansfyrisitingin | 31,8 | 35,8 | 35,2 | 38,2 | 39,8 |
| § 3 | Fíggjarmál | 199,8 | 208,2 | 232,8 | 297,3 | 331,5 |
| § 5 | Fiskivinna | 165,3 | 167,2 | 193,4 | 169,5 | 176,3 |
| § 6 | Vinnumál | 284,5 | 287,4 | 263,8 | 314,4 | 302,8 |
| § 7 | Útbúgving og gransking | 691,3 | 717,5 | 747,7 | 807,1 | 862,0 |
| § 8 | Almanna- og heilsumál | 1.809,0 | 1.906,4 | 1.944,0 | 2.050,3 | 2.154,9 |
| § 15 | Innlendismál | 108,7 | 109,3 | 126,7 | 158,3 | 172,7 |
| **Tilsamans** | | **3.323,9** | **3.467,1** | **3.578,2** | **3.875,1** | **4.081,4** |

Viðm: Tølini fyri 2007 eru fyribils metingar, og tølini fyri 2008 eru úr fíggjarlógaruppskotinum.

Tað skal viðmerkjast, at ein týðandi orsøk til vøksturin í rakstrarútreiðslunum í 2007 og 2008 er, at meirvirðisgjaldsfrítøkan fyri lønir til bygging og umvæling av egnum bústaði er løgd um til stuðul, sum verður mett at kosta landskassanum 25 mió. kr. í 2007 og 50 mió. kr. í 2008. Stuðul til rentuútreiðslur hækkar 13,3 mió. kr. og FAS-endurgjaldið hækkar 13,4 mió. kr. á fíggjarlógaruppskotinum 2008 samborið við fíggjarlógina 2007.

**Talva 5.5: Nettoløguútreiðslur landskassans, 2004-2008**

| *Mió. kr.* | | **2004** | **2005** | **2006** | **2007** | **2008** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| § 1 | Løgtingið | 0,8 | 6,4 | 22,8 | 2,0 | 1,0 |
| § 2 | Løgmansfyrisitingin | 2,5 | 2,5 | 3,4 | 2,3 | 1,5 |
| § 3 | Fíggjarmál | 1,5 | -0,7 | 0 | 1,0 | 1,5 |
| § 5 | Fiskivinna | 0,0 | 0,6 | 9,0 | 14,0 | 10,5 |
| § 6 | Vinnumál | 89,0 | 80,8 | 151,0 | 128,1 | 38,0 |
| § 7 | Útbúgving og gransking | 6,7 | 14,5 | 24,9 | 83,8 | 61,0 |
| § 8 | Almanna- og heilsumál | 61,5 | 65,9 | 56,8 | 45,0 | 76,5 |
| § 15 | Innlendismál | 66,0 | 30,8 | 0 | 2,2 | 4,0 |
| **Tilsamans** | | **228,1** | **200,8** | **267,7** | **288,4** | **194,0** |

Viðm: Tølini fyri 2007 eru fyribils metingar, og tølini fyri 2008 eru úr fíggjarlógaruppskotinum.

## 5.5 Raðfestingar hjá einstøku landsstýrismonnunum í 2008

Í talvu 5.6 er stutt yvirlit yvir, hvussu gongdin er í ymsu játtanarsløgunum frá fíggjarlógini 2007 til fíggjarlógaruppskotið 2008, og hvussu broytingarnar eru býttar millum ymsu greinirnar. Nágreiniligar viðmerkingar og grundgevingar fyri

broytingunum eru í viðmerkingunum til einstøku høvuðskonturnar í fíggjarlógaruppskotinum.

Í fíggjarlógaruppskotinum 2008 økjast rakstrarútreiðslurnar 160,6 mió. kr. Lógarbundnu útreiðslurnar vaksa 135,9 mió. kr. Nettoløguútreiðslurnar minka 66,5 mió. kr. Játtanin til landsfyritøkur veksur 6,3 mió. kr. og onnur játtan minkar 346 mió. kr., harav vaksa útreiðslurnar 42,4 mió. kr. og inntøkurnar vaksa 388,4 mió. kr.

Farið verður tí frá einum avlopið á 51,8 mió. kr. á fíggjarlógini 2007 til eitt avlop á 176,6 mió. kr. á fíggjarlógaruppskotinum 2008.

**Talva 5.6: Broytingar frá fíggjarlógini 2007 til fíggjarlógaruppskotið 2008**

| § | FL-2007 | Rakstur | Lóg | Løga | Landsf. | Onnur | FLU-2008 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | -41.780 | -1.099 | -503 | 1.000 | - | - | -42.382 |
| 2 | -40.387 | -1.754 | - | 800 | - | - | -41.341 |
| 3 | -241.586 | -13.138 | -64.360 | -500 | - | -13.400 | -332.984 |
| 5 | -182.900 | -6.000 | -1.000 | 3.500 | - | -400 | -186.800 |
| 6 | -427.104 | 7.106 | -2.100 | 88.100 | - | -6.850 | -340.848 |
| 7 | -864.908 | -43.647 | -13.912 | 15.100 | - | -15.624 | -922.991 |
| 8 | -2.044.092 | -88.767 | -53.979 | -38.500 | - | -6.067 | -2.231.405 |
| 15 | -154.124 | -13.254 | - | -3.000 | -6.313 | -44 | -176.735 |
| 20 | 4.048.665 | - | - | - | - | 403.371 | 4.452.036 |
| | **51.784** | **-160.553** | **-135.854** | **66.500** | **-6.313** | **360.986** | **176.550** |

Niðanfyri eru vístar nakrar broytingar frá fíggjarlógini 2007 til fíggjarlógaruppskotið 2008, sum eru størri enn 1 mió. kr.

**§ 1 Løgtingið:**

Karmurin hjá Løgtinginum hækkar 0,6 mió. kr. í fíggjarlógaruppskotinum 2008 samanborið við fíggjarlógina 2007. Rakstrarútreiðslurnar verða øktar 1,6 mió. kr. og løgujáttanin til løgtingshúsið lækkar 1 mió. kr.

**§ 2 Løgmansfyrisitingin:**

Karmurin hjá løgmanni hækkar 1 mió. kr. í fíggjarlógaruppskotinum 2008 samanborið við fíggjarlógina 2007. Játtanin til sendistovur hækkar 1,4 mió. kr. og løgujáttanin til ognirnar úti á Tinganesi lækkar 0,8 mió. kr.

**§ 3 Fíggjarmál:**

Karmurin hjá landsstýrismanninum í fíggjarmálum verður øktur 91,4 mió. kr. í fíggjarlógaruppskotinum 2008 samanborið við fíggjarlógina 2007.

| | | |
|---|---|---|
| -Stuðul til bygging og umvæling av egnum bústaði | - | 50,0 mió. kr. |
| -Toll- og skattstova Føroya | - | 4,7 mió. kr. |
| -Føroya Gjaldstova | - | 3,1 mió. kr. |
| -FAS-endurgjald | - | 13,4 mió. kr. |
| -Stuðul til rentuútreiðslur | - | 13,3 mió. kr. |
| -Hagstova Føroya | - | 1,7 mió. kr. |

**§ 5 Fiskivinna:**

Karmurin hjá landsstýrismanninum í fiskivinnumálum verður øktur 3,9 mió. kr. í fíggjarlógaruppskotinum 2008 samanborið við fíggjarlógina 2007.

| | | |
|---|---|---|
| -Fiskimálaráðið | - | 4,0 mió. kr. |
| -Trygdarmiðstøðin | - | 4,0 mió. kr. |
| -Fiskiveiðieftirlitið | - | 2,6 mió. kr. |
| -Flutningsstuðul | - | 2,0 mió. kr. |
| -Fiskivinnuroyndir | - | 1,0 mió. kr. |
| -Inntøkutrygd | + | 1,0 mió. kr. |
| -Hvalagransking og hvalateljing o.a. | + | 1,5 mió. kr. |
| -Tilbúgvingarætlan | + | 7,5 mió. kr. |

**§ 6 Vinnumál:**

Karmurin hjá landsstýrismanninum í vinnumálum lækkar 86,3 mió. kr. í fíggjarlógaruppskotinum 2008 samanborið við fíggjarlógina 2007.

| | | |
|---|---|---|
| -Jarðfeingi | + | 13,9 mió. kr. |
| -Fiskasjúkutænastur | - | 1,2 mió. kr. |
| -Vinnuframastovan | - | 2,3 mió. kr. |
| -Kappingarráðið | - | 1,6 mió. kr. |
| -Skráseting Føroya | - | 1,0 mió. kr. |
| -Endurgjald til skipasmíð | - | 3,0 mió. kr. |

| | | |
|---|---|---|
| -Heilsufrøðiliga Starvstovan | - | 3,3 mió. kr. |
| -Heilsufrøðiliga Starvstovan (løgujáttan) | + | 4,0 mió. kr. |
| -Granskingarlund | + | 1,0 mió. kr. |
| -Partabrøv | + | 1,4 mió. kr. |
| -Landsverk | + | 2,5 mió. kr. |
| -Nýggir landsvegir | + | 84,1 mió. kr. |
| -Stuðul til infrakervið | + | 1,1 mió. kr. |
| -Flogferðsla | - | 1,0 mió. kr. |
| -Stuðul til rakstur av undirsjóartunlum | - | 5,7 mió. kr. |
| -Barsilsskipanin | - | 1,6 mió. kr. |

**§ 7 Útbúgving og gransking:**

Karmurin hjá landsstýrismanninum í útbúgvingar- og granskingarmálum verður øktur 58,1 mió. kr. í fíggjarlógaruppskotinum 2008 samanborið við fíggjarlógina 2007.

| | | |
|---|---|---|
| -Fólkaskúlin | - | 19,7 mió. kr. |
| -Miðnámsútbúgvingar | - | 10,6 mió. kr. |
| -Fiskivinnuskúlin | - | 6,7 mió. kr. |
| -Lestrarstudningur | - | 5,7 mió. kr. |
| -Studningur til kirkjugrunnin | - | 6,6 mió. kr. |
| -Læraraeftirlønir | - | 6,0 mió. kr. |
| -Sernámsdepilin | - | 3,3 mió. kr. |
| -Norðurlandahúsið | - | 3,0 mió. kr. |
| -Fróðskaparsetur Føroya | - | 3,2 mió. kr. |
| -Studningur til lærupláss | - | 2,2 mió. kr. |
| -Granskingargrunnurin | - | 2,0 mió. kr. |
| -Skúlabókagrunnurin | - | 2,0 mió. kr. |
| -Stuðul til fólkaskúlar | - | 1,3 mió. kr. |
| -Læraraskúlin | - | 1,3 mió. kr. |
| -Læraraskúlin (løgujáttan) | - | 1,0 mió. kr. |
| -Studentaskúlin í Hoydølum | - | 1,0 mió. kr. |
| -Skúladepilin í Marknagili | + | 1,0 mió. kr. |
| -Ymsar felagsútreiðslur | + | 1,5 mió. kr. |
| -Klaksvíkar Sjómansskúli | + | 1,2 mió. kr. |
| -Skúladepil í Suðuroy | + | 2,0 mió. kr. |
| -Tekniski Skúli í Klaksvík | + | 5,0 mió. kr. |
| -Yvirtøka av prestagørðum | + | 15,6 mió. kr. |

**§ 8 Almanna-og heilsumál:**

Karmurin hjá landsstýrismanninum í almanna- og heilsumálum verður øktur 187,3 mió. kr. í fíggjarlógaruppskotinum 2008 samanborið við fíggjarlógina 2007.

| | | |
|---|---|---|
| -Søla av íbúðarbygningum | - | 35,0 mió. kr. |
| -Fyritíðarpensjón | - | 15,7 mió. kr. |
| -Stuðulstænastan | - | 4,4 mió. kr. |
| -Eldrarøkt | - | 19,1 mió. kr. |
| -Landssjúkrahúsið | - | 26,5 mió. kr. |
| -Vanlig forsorg | - | 19,4 mió. kr. |
| -Serforsorg | - | 8,3 mió. kr. |
| -Barnaískoyti | - | 7,0 mió. kr. |
| -Fólkapensjón | - | 5,8 mió. kr. |
| -Viðbót til ávísar pensjónistar | - | 3,8 mió. kr. |
| -Børn og ung | - | 3,7 mió. kr. |
| -Bústovnar o.a. | - | 8,8 mió. kr. |
| -Stuðul til fyriskipanir fyri heimleys | - | 3,1 mió. kr. |
| -Almannastovan | - | 2,6 mió. kr. |
| -Barnavernd | - | 1,8 mió. kr. |
| -Suðuroyar Sjúkrahús | - | 3,1 mió. kr. |
| -Sjúkrakassar | - | 2,0 mió. kr. |
| -KT-heildarskipan til Almannastovuna | - | 5,0 mió. kr. |
| -Klaksvíkar Sjúkrahús | - | 3,4 mió. kr. |
| -Klaksvíkar Sjúkrahús (løgujáttan) | - | 1,0 mió. kr. |
| -Serviðgerð uttanlands | - | 9,8 mió. kr. |
| -Suðuroyar Sjúkrahús (løgujáttan) | - | 2,2 mió. kr. |
| -Koppseting | - | 1,2 mió. kr. |
| -Dagpengaskipanin | - | 3,1 mió. kr. |
| -Landssjúkrahúsið, útbygging | + | 1,6 mió. kr. |
| -Eldrasambýli | + | 7,0 mió. kr. |

**§ 15 Innlendismál:**

Karmurin hjá landsstýrismanninum í innlendismálum verður øktur 22,6 mió. kr. í fíggjarlógaruppskotinum 2008 samanborið við fíggjarlógina 2007.

| | | |
|---|---|---|
| -Umhvørvisstovan | - | 19,2 mió. kr. |
| -Innlendismálaráðið | + | 1,6 mió. kr. |
| -Føroya Náttúrugripasavn | + | 3,1 mió. kr. |
| -Umhvørvisvernd | + | 3,5 mió. kr. |
| -Skógrøkt Landsins | + | 2,7 mió. kr. |
| -Tinglýsingarstovan | - | 3,4 mió. kr. |
| -Strandfaraskip Landsins | - | 6,3 mió. kr. |
| -Strandfaraskip Landsins (løgujáttan) | - | 3,0 mió. kr. |
| -Ymsar útreiðslur | - | 1,3 mió. kr. |

**§ 20 Inntøkur:**

Í fíggjarlógaruppskotinum 2008 vaksa inntøkur landskassans 388,4 mió. kr. samanbornar við fíggjarlógina 2007.

| | | |
|---|---|---|
| -Útluting úr Fíggingargrunninum frá 1992 | - | 38,0 mió. kr. |
| -Endurrindan av keyps-MVG | - | 30,0 mió. kr. |
| -Rentur at gjalda | - | 15,2 mió. kr. |
| -Útluting frá almennum partafeløgum | - | 10,0 mió. kr. |
| -Kolvetnisskattur, feløg | - | 5,0 mió. kr. |
| -Kolvetnisskattur, persónar | - | 3,0 mió. kr. |
| -Útgoldið avlop frá Danmarks Nationalbank | - | 2,0 mió. kr. |
| -Avgjald av kapitaleftirlønum | + | 2,0 mió. kr. |
| -Ferðaavgjald | + | 2,0 mió. kr. |
| -Brennioljugjald | + | 3,0 mió. kr. |
| -Lønhæddargjald | + | 3,3 mió. kr. |
| -Framleiðsluavgjøld | + | 4,0 mió. kr. |
| -Gjald til Barsilsskipan | + | 8,0 mió. kr. |
| -Útgoldið avlop frá Landsbanka Føroya | + | 9,0 mió. kr. |
| -Vegskattur (vektgjald) | + | 9,0 mió. kr. |
| -Felagsskattur | + | 10,0 mió. kr. |
| -Tollavgjøld | + | 12,0 mió. kr. |
| -Skrásetingargjald | + | 20,0 mió. kr. |
| -Rentuinntøkur av innistandandi | + | 22,5 mió. kr. |
| -Tinglýsingargjald | + | 25,5 mió. kr. |
| -Punktgjøld | + | 27,0 mió. kr. |
| -Kapitalvinningsskattur | + | 40,0 mió. kr. |
| -Vanligur landsskattur | + | 74,0 mió. kr. |
| -Meirvirðisgjald | + | 235,0 mió. kr. |

## 5.6 Løgur 2008

Í 2008 verða gjørdar løgur fyri 194 mió. kr., sí talvu 5.7. Hóast løguútreiðslurnar eru væl minni enn tær vóru í 2007, so verða tey bleytu virðini raðfest høgt í 2008.

Samlaða løguætlanin minkar úr 260,5 mió. kr. í 2007 niður í 194 mió. kr. í 2008, men nettoløguútreiðslurnar til almanna- og heilsumál verða eitt lítið vet hægri í 2007 enn í 2008.

Størsti parturin av løguútreiðslunum á mentanarøkinum fara til skúlar, fróðskaparsetur. Skúlar og granskingarstovnar hava tí eisini fingið hægri raðfesting í 2008 enn í 2007.

**Talva 5.7: Løguætlanin fyri 2008** (1.000 kr.)

| | | |
|---|---|---|
| § 1 | **Løgtingið** | **1.000** |
| | Løgtingshús | 1.000 |
| § 2 | **Løgmansfyrisitingin o.a.** | **1.500** |
| | Umbygging í Tinganesi | 1.500 |
| § 3 | **Fíggjarmál** | **1.500** |
| | Flyting av fíggjar- og búskaparstovnum landsins | 1.500 |
| § 5 | **Fiskivinna** | **10.500** |
| | Tilbúgvingarætlan | 1.500 |
| | Útgerð til Magnus Heinason | 3.000 |
| | Trygdarmiðstøðin | 6.000 |
| § 6 | **Vinnumál** | **113.000** |
| | Umbygging av Heilsufrøðiligu Starvsstovuni | 1.000 |
| | Flogferðsla | 1.000 |
| | P/F Vága Floghavn, útbygging | 65.000 |
| | Øravík-Hov | 1.000 |
| | Tjørnuvík | 1.000 |
| | Klaksvík-Norðoyri | 1.000 |
| | Fossá, Haldarsvík | 600 |
| | Innkoyringarvegur til Tórshavn | 6.000 |
| | Inni í Firði, Kollafjørður | 3.000 |
| | Trygdartiltøk, størri ábøtur og at taka til | 4.000 |
| | Farleið til Dals | 1.000 |
| | Tunnil norð um fjall til Viðareiðis | 1.500 |
| | Vegagerð í Leirvík | 10.000 |
| | Vegagerð í Kalsoy, vegir og tunnlar | 2.000 |
| | Kanning av føstum sambandi undir Skopunarfjørð | 7.000 |
| | Brúgvin um Streymin | 4.000 |
| | Vegurin Sandarlíð | 2.000 |
| | Undirføring við Norðskála | 1.000 |
| | Vegurin til Saksunar | 1.000 |
| § 7 | **Útbúgving og gransking** | **61.000** |
| | Skúladepil í Suðuroynni | 32.000 |
| | Fiskivinnuskúlin í Vestmanna | 16.000 |
| | Eftirskúli í Hvalba | 500 |
| | Skúlin á Trøðni | 1.000 |
| | Studentaskúlin í Hoydølum | 3.000 |
| | Vinnuháskúlin | 1.000 |
| | Føroya Læraraskúli | 1.000 |
| | Bókasøvn | 1.000 |
| | Kirkjubømúrurin | 500 |
| | Nýggj tøkni til Kringvarp Føroya | 3.000 |
| | Yvirtøka av prestagørðum (umvæling) | 2.000 |
| § 8 | **Almanna- og heilsumál** | **76.500** |
| | Apoteksverkið | 7.000 |
| | Medicoteknisk tól | 8.150 |
| | Landssjúkrahúsið | 31.400 |
| | Klaksvíkar Sjúkrahús | 2.000 |
| | Suðuroyar Sjúkrahús | 2.200 |
| | Bústovnar | 14.750 |
| | Eldrasambýlið | 11.000 |
| § 15 | **Innlendismál** | **4.000** |
| | Strandfaraskip Landsins | 4.000 |
| | **Løgur tilsamans** | **269.000** |
| § 6 | Søla av oljutangum landsins og jørð til kommunurnar | 10.100 |
| § 6 | Flyting úr Íleggingargrunninum til Vága Floghavn | 65.000 |
| | **Løguúteiðslur tilsamans íroknað søla av løgum** | **194.000** |

## 5.7 Gongdin í skuld og gjaldføri landskassans

Langfreistaða bruttoskuld landskassans var 2,6 mia. kr. í august 2007. Av hesum vóru 2,1 mia. kr. lánsbrævaskuld og 500 mió. kr. vóru skuld til danska ríkiskassan.[6]

Einskiljingin av P/F Føroya Banka hevur verið eitt gott ískoyti til gjaldføri landskassans í 2006 og 2007. Í 2006 vórðu umleið 600 mió. kr. fluttar landskassanum í vinningsbýti í sambandi við at kapitalbygnaðurin í Føroya Banka varð tillagaður áðrenn einskiljingina. Í august í ár vórðu góðar 1,2 mia. kr. fluttar landsbankanum eftir at 2/3 av Føroya Banka varð seldur.

**Mynd 5.2: Gjaldføri landskassans í Landsbanka Føroya**




Kelda: Landsbanki Føroya.

Tað er ásett við lóg, at innlánið hjá landskassanum í Landsbanka Føroya skal vera 15% av BTÚ, landsstýrið hevur heimild at trekkja upp til 70% av minstainnláninum. Í september í ár var innlánið 2.096 mió. kr. ella 596 mió. kr. omanfyri minstakravið, sí mynd 5.2.

[6] Hesar 500 mió. kr. eru rentu- og avdráttarfríar so leingi eingin olja er funnin í føroysku undirgrundirini. Er eingin olja funnin innan 2018, verða tær avskrivaðar.